## Fíggjarkreppan steðgar Liverpool

Fyribils hevur enska Liverpool útsett ætlanir sínar um at byggja sær nýtt stadion í Stanley Park. Ætlaða stadion-projektið varð kostnaðarmett til 4,14 milliardir krónur, og tað er trupult at finna fígging til hetta í løtuni. – Vit hava ikki slept ætlanini. Men byggingin er útsett, til núverandi fíggjarkreppan í bankaheiminum er av, sigur Christian Purslow, stjóri í Liverpool. Ætlandi skal nýggi leikvøllurin taka 60.000 áskoðarar.



## Stuðulsrenning í SMS

Komandi dagarnar verða fleiri spennandi rørsluátøk í SMS. Eitt nú verður møguleiki at máta blóðtrýst, vekt, BMI, miðju- og mjadnarmát og lungaorku. Sportmaster hevur júst bygd handilin um, og har verður sjálvandi gjørt nógv burturúr, eins og Rit & Rák hevur fingið sær stórt úrval av bókum um heilsu og lívsstíl til vega. Eisini skipar Bragdið fyri stuðulsrenning á rennibondum, og her kunnu virkir og einstaklingar velja at stuðla rennarum við ávísari upphædd fyri hvønn kilometur.

# U-21 skal sinniliga trimmast




**Eftir sigurin á Russlandi er takið at fáa spælararnar at fokusera fult og heilt á uppgávuna ímóti Moldova**




Jákup Mørk

Klokkan 15 í morgin fer U-21 landsliðið at bjóða Moldova av á ovara vølli í Gundadali. Talan er um fyrstu uppgerðina hjá liðnum eftir sensatiónina, tá ið tað á sama vølli 9. juni eydnaðist at vinna 1-0 á Russlandi.

Tað er greitt, at føroyska liðið ikki verður mannað við teimum somu ellivu, sum vunnu á Russlandi. Málskjúttin, Jóan Símun Edmundsson, er við a-landsliðnum í Eysturríki, og vinstri vongverjin, Erling Jacobsen, er ikki rættiliga komin fyri seg aftur, eftir at hann í steypafinaluni á ólavsøku varð skaddur.

Tað eru Heðin Askham og Bill Jacobsen, sum venja U-21, og takið hjá teimum er at fáa spælararnar at taka avbjóðingina í eins stórum álvara, sum teir vístu ímóti Russlandi:

- Tá ið størstu tjóðirnar vitja her, so vita vit, at um vit ikki arbeiða yvir evni, so tapa vit stórt. Onkra ferðina eru vit hepnir, tí stóru tjóðirnar tilvitað ella ótilvitað undirmeta okkum, og so hava vit møguleika at røkka góðum úrsliti, sum vit gjørdu ímóti Russlandi, staðfestir Bill Jacobsen, sum vísir á vandan, ið lúrir, nú tað er Moldova, sum vitjar:

- Teir hava bara spælt ein dyst í hesi undankappingini. Tað var ímóti Letlandi, sum teir vunnu 1-0 ímóti. Sjálvandi eru teir ógvuliga væl fyrireikaðir ímóti okkum, og teir fara heilt víst at vísa væl betri hugburð, enn russararnir gjørdu. Tað er møguleiki hjá okkum at vinna, men vit vinna bara, um vit eru fult og heilt savnaðir um hesa uppgávuna.

### Stór kapping um plássini

Tá ið Føroyar vunnu 1-0 ímóti Russlandi, var liðið soleiðis mannað: Jóan Pauli D. Jakobsen - Pætur Jørgensen, Rógvi Holm, Pól Jóhannes Justinussen, Erling Jacobsen – Kristoffur Jacobsen - Jóhan Ellingsgaard, Róaldur Jacobsen, Christian R. Mouritsen, Jóan Símun Edmundsson - Páll Klettskarð.

Jóhan Ellingsgaard er smáskaddur og harvið er ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla.

Tað er stór kapping um plássini. Hans Jørgensen, sum var skaddur í summar, er komin fyri seg aftur. Hann kappast við Jóan Paula D. Jakobsen um málverjuplássið. Hans venur í Herfølge, og venjari hjá honum er sami maður, sum í síni tíð vandi Jákup Mikkelsen.

Millum teir, sum kappast um verjuplássini eru Dánjal Davidsen, ið hevur verið eyðsýndur í EB/Streymi, Odmar Færø og Rógvi Baldvinsson, ið er abbasonur B36 veteranin Baldvin Baldvinsson. Rógvi spælir í næstbestu norsku deildini.

Boð upp á vinstra vongverjan, sum Erling Jacobsen síðst røkti, eru Heri Nesá, sum spælir á næstbesta liðnum hjá AGF, har hann venur saman við liðnum í superliguni, og Viljolmur Davidsen, sum er fastur maður á U-19 liðnum hjá OB.

**Úrslitið móti Russlandi prógvar, at tað ber til hjá føroyska U21-landsliðnum. Men tað krevur, at menn eru eins fokuseraðir upp á uppgávuna leygardagin, sum teir vóru tað móti Russlandi**

Wensil Steinarr Ragnarsson Kamban, sum er uppvaksin í Íslandi, er boðsendur sum evni til miðvøllin. Hann spælir við Afturelding í næstbestu íslendsku deildini. Mamman er úr Havn.

Onnur evni til miðvallarpláss, sum ikki vóru tøkir seinast, eru 17 ára gamli Hallur Hansson, sum er uppvaksin í HB, og sum nú hevur strítt seg til kjans á beinkinum á besta liðnum í Aberdeen, og Rógvi Poulsen, sum seinast var upptikin av próvtøku.

Einsamalla álopsplássið eru tað tveir spælarar, sum kappast um. Annar er Páll Klettskarð, sum røkti plássið ímóti Russlandi, og so er tað Finnur Justinussen. Hann var skaddur, tá ið Russland var á skránni. Finnur er toppskjútti í Vodafondeildini.

Landsliðið heldur til á Hotel Vágum. Klokkan 15 í dag fara teir at venja í Sørvági, og tá man liðið fara at vera klárt:

- Í løtuni ivast vit ið, hvussu fýra pláss skulu mannast, segði Bill Jacobsen í gjárkvøldið.

## Golf-fundur í Havn

Ítróttasamband Føroya, Deildarsambandið fyri Nýstovnaðan Ítrótt og Tórshavnar Golfklubbi vilja við hesum bjóða tygum til ein almennan fund um golf í Føroyum í Norðurlandahúsium hósdagin 10. september klokkan 10 til 12.

Á fundinum verða millum annað hesi evni umrødd:

- Golf sum ítróttagrein í vøkstri kring heimin
- Týdningurin av einum golfvølli fyri ferðavinnuna
- Hvussu kann íløgan í ein golfvøll fíggjast?
- Hvussu verður vøllurin skilabest rikin?

Seinastu árini hevur øktur áhugi verið fyri ítróttagreinini golf kring heimin. Við øktum denti á fólkaheilsu hava nógv sæð golf sum eitt høvi hjá øllum aldursbólkum at røra seg, samstundis sum tey hava tað stutligt.

Áhugin í Føroyum er eisini vaksandi - eitt felag er í Havnini, og fleiri kommunur kring landið hava víst áhuga fyri, at ein golfvøllur verður gjørdur í kommununi.

Um Føroyar skulu skipa fyri Oyggjaleikunum aftur, er ivaleyst neyðugt við einum 18-hols golfvølli í Føroyum.

Fyriskipararnir av fundinum vóna, at síggja tey, ið varða av golf í Føroyum, almennar mynguleikar, kommunur, ferðavinnuna, fyritøkur og annars øll golfáhugaði.

Á fundinum luttaka OL- og úrvalsstjóri í Danska Ítróttasambandinum, Jesper Frigast Larsen, ið fyrr hevur verið liðskipari á danska golflandsliðnum og aðalskrivari í Danska Golfsambandinum, og Torben Kastrup Pedersen, ið er vallarstjóri hjá Danska Golfsambandinum.